## Chelsea aftur á sigurskós



Eftir soltna úrtøku í bæði Premier League og í Champions League seinastu vikurnar kom Chelsea aftur á rætta kós, tá teir í gjárkvøldið vitjaðu á Mestalla í Valencia. Tað sá tó einki út hjá Chelsea, tá David Villa eftir bert átta minuttum legði heimaliðið fram um eftir eina verjuvillu. Chelsea fótaði sær tó so við og við, og stutt undan steðginum javnaði Joe Cole fyri gestirnir. Í seinna hálvleiki var sami Joe Cole arkitekturin aftan fyri sigursmálið hjá Chelsea, tá hann spældi Drogba frían við einari sera góðari avlevering. Sostatt fekk Chelsea uppreisn fyri vánaligu úrslitini síðstu vikurnar.

## Ukrainar ikki til at steðga

Ukrainska liðið, Shaktar Donetsk, er ikki til at steðga í Champions League-kappingini. Eftir sigur í fyrsta umfari eydnaðist teimum aftur í gjár at vinna í øðrum umfari. Her vóru teir á vitjan í Portugal hjá Benfica, og Shaktar vann dystin 1-0. Málið bleiv skotið av brasiliumanninum Jadson, eftir gott forarbeiði av landsmanninum Fernandinho og rumenanum, Razvan Rat. Eftir sigurin er Shaktar nú á odda við fullum stigatali, meðan AC Milan og Celtic hava trý stig hvørt. Aftast er Benfica við ongum stigi.

# - Eg mátti gevast

**- Tá ið eg ikki fái spælt 100%, so kann eg ikki spæla á landsliðnum, sigur tvørámaðurin Óli Johannesen, sum er givin á føroyska fótbóltslandsliðnum. Óli ætlar sær helst at halda fram við at spæla fyri TB, og hann er ímóti, at besta liðið hjá TB skal leggja saman við hini suðuroyarliðini**

**FÓTBÓLTUR**
*Niels Petersen*

Óli Johannesen spældi sín fyrsta dyst fyri Føroyar í 1992 og nú 15 ár seinni hevur hann valt at geva endaligt avboð til landsliðsfótbólt.

35 ára gamli tvørámaðurin hevur í eina tíð umhugsað, nær tíð var at gevast.

- Eg og Jógvan Martin hava tosað um tingini, og endalig støða er tikin. Eg meti ikki kroppin vera heilt kláran, og serliga hælsinan hevur argað og plágað meg. Tá ið eg ikki fái spælt 100%, so kann eg ikki spæla á landsliðnum, tí har krevst at ein er púra klárur til hvønn dyst, greiðir Óli Johannesen frá og leggur afturat, at hann hevði ætlað at steðga á landsliðnum eftir hesa EM-undankappingina undir øllum umstøðum.

Spurdur um hvat Óli nú fer at takast við, svarar han, at nú kann hann uppliva hvussu landsdystir eru, sæð frá áskoðaraplássunum. Hann fortelur eisini, hvussu hann nú kann brúka meiri tíð saman við konuni og 4-ára gomlu dóttur teirra. Tó viðgongur hann, at tað óivað fer at prika millum tædnar tá hann sær fyrrverandi liðfelagar sínar ganga inn á vallarnar kring heimin.

Eftir 15 ár hevur Óli megnað at spælt heili 82 landsdystir og er hetta met í føroyskum fótbóltshøpi.



*Liðformaðurin á landsliðnum, Óli Johannesen, hevur takkað fyri seg, men hann heldur helst fram at spæla fótbólt fyri barndómsefelagið TB. Óli heldur, at TB skal ikki leggja saman við hini Suðuroyarliðini*

### Mong góð minnir

Eftir so mong ár og dystir er sjálvsagt ein rúgva av upplivingum sum Óli hevur fingið. Spurdur um hann kundi nevna nakrar, fortaldi hann við brosandi rødd um, tá tvørámenn talsterkir vóru farnir á Svangaskarð at heiðra býarbarni teirra, tá Føroyar tóku móti Wales.

- Tey róptu á meg allan dystin á tamb, og eg var sera fegin um hetta. Hesir fjepparir høvdu fingið gjørt sær t-shirts við navninum hjá mær á, og eg fekk eisini eina frá teimum, við undirskriftum hjá øllum ernu suðringunum í ferðalagnum. Tann troyggjan verður goymd sum reyða gull.

Sæð út frá einum ítróttarligum sjónarhorni eru tað serliga tvær løtur, ið Óli minnist aftur á.

- Tá vit javnaðu til 1-1 á útivølli móti so mætari fótbóltstjóð sum Týsklandi, og áskoðarafjøldin, ið taldi gott og væl 40.000, brátagnaði. Tað er eitt gott minni.

Rammurnar um hendan dystin í Týsklandi vóru eisini sera stórslignar og professionellar. Hetta eyðkenda tað týska, har alt var eftir bókini og eingin ivi var um nakað sum helst. Hatta var man ikki vanur við á Sevmýru, á Tórsvølli ella á Svangaskarði. Í øllum førum ikki í eins stóran mun.

- Eisini minnist eg rættuliga væl, tá eg sum liðskipari heilsaði uppá franska liðskiparan, Zinedine Zidane, undan dystinum ímóti Fraklandi. Hann var í mínum eygum heimsins besti fótbóltsspælari, og tað var ein stór løta hjá mær, minnist Óli aftur á.

Óli spælur ikki bara fótbólt, hann er útbúgvin lærari og er í arbeiði sum einalærari í Hovs Skúla. Høvuðslærugreinar hansara undir lestrinum vóru landalæra, søga og ítróttur. Hetta hevur, á mongu fótbóltsferðum við landsliðnum, givið Óla fleiri ógloymandi og fjøltáttaðar upplivingar. Ein av hesum var, tá landsliðið vitjaði í Ísrael.

- Vit gingu í Jerusalem býi og sóu hvussu viðurskiftini vóru har. Hetta var sera stórt helt eg, fortelur Óli.

Sjálvt um Óli er givin við landsliðsfótbólt er ikki greitt, um hann gevst heilt við fótbóltinum. Hann sigur seg ikki hava tikið avgerð um tað enn og greiður víðari frá, at um so er, at hann framhaldandi fer at spæla, so verður tað við barndómsfelagnum T.B.

### Ímóti samanlegging

Hvat heldur Óli so um ætlanirnar um at leggja bestu liðini hjá fótbóltsfeløgunum í Suðuroynni